Stjørnan-StÍF 25-23 (16-11):

# Tungt hjá Stjørnuni

**Tað var um reppið, at Stjørnan snávaði í heimadystinum móti StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki væntandi, at Stjørnan skuldi fáa stórvegis trupulleikar av gestunum leygardagin. Gaman í var øvuta uppgerðin ein av teimum, har oddaliðið akkurát fekk skavað tvey stig saman, men stigatalvan tosaði somikið týðuliga um klassamun, at alt annað enn ein tryggur heimasigur var mest sum óhugsandi.

### Noktaðu at gevast

Men tað var tó ikki heilt so óhugsandi. Fyrra hálvleik høvdu tær á heimaliðnum annars gott tak á, og hóast hvørki Alina Olaru ella Joan M. Djordjevic vóru við hesaferð, so tóktist hetta ikki skula nerva nakað stórvegis.

Uttan áður nevndu stuðulsleikarar, so fór tó spakuliga at tynnast hjá Stjørnuni. Tær megnaðu ikki á vanliga háttin at halda eini støðugari leikferð gjøgnum allan dystin, og tá tær kanska samstundis fóru at taka nakað lætt upp á uppgávuna, gjørdist seinni hálvleikur nakað væl meira spennandi, enn ætlanin mundi vera.

Serstakliga stóð nógv á seinastu knøppu tíggju minuttirnar. Kanska helt Stjørnan nú, at sigurin var heima, men StÍF vildi ikki geva skarvin yvir. Við trimum málum á rað minkaðu tær munin niður í eitt mál, og tó at Stjørnan svaraði hesum aftur einaferð, so fingu gestirnir aftur strítt seg á 24-23 bert lítlan minutt fyri leiklok.

Heimaliðið átti tó sítt time-out eftir, og nú varð hetta eisini tikið, so kalt vatn kundi sláast í blóðið. Tað eydnaðist eisini at koyra eitt trygt álop fram til avgerandi skoringina, og so var ikki meira, sum StÍF kundi gera. Enn einaferð høvdu tær verið heilt nær við at koppa Stjørnuni, men enn einaferð var staðfestingin, at eitt meistaralið ikki altíð er tað, sum spælir best. Men tað er tað, sum vinnur mest!

## FAKTA UM DYSTIN

**Stjørnan-StÍF 25-23 (16-11)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Annika Ljósstein 8(7), Katarina Stepanov 7, Anna Kristina Samson 4, Una Olsen 3, Bára S. Klakstein 2, Louisa Andreasen 1
**StÍF:** Poula D. Olsen 8, Rebekka Justinussen 6(1), Sunfríð B. Jacobsen 5(1), Malan Petersen 2, Paula B. Høgnesen 2
**Brotskøst:** Stjørnan 7, StÍF 6
**Útvísingar:** StÍF 1
**Dómarar:** Sámal Hansen & Dánjal Samuelsen

Kyndil-VB 17-31 (12-19):

# Fult hús í høvuðsstaðnum



*Hóast talan varð um tveir dystir í tveir dagar, so hevði VB ongan hug at snáva, tá Kyndil var mótstøðuliðið sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Aðru ferð innan tveir dagar vann VB sær tvey stig í Havnini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki tann heilt sami spenningurin, tá VB sunnudagin annan dagin á rað skuldi spæla í høllini á Hálsi í Havn.

Kyndil, sum hesaferð var mótstøðuliðið, evur seinnu árini ikki verið eitt av liðunum, sum hava stríðst serliga ovarliga á talvuni, og tí kundi ikki roknast við, at tær fóru at gera nakað stórvegis við VB.

Og tann veruleikin varð eisini skjótt staføestur. VB legði alt fyri eitt eitt hampuliga stórt hol niður til tær grønu, og tó at Kyndil eftir hetta slapp at spæla eitt sindur við, so kom spenningur ongantíð í dystin.

Og eftir steðgin staðfestu VB-kvinnurnar eisini, at tær ikki ætlaðu sær at tveita nakað stig burtur. Tær høvdu kanska ikki tí heilt stóru ferðina á, og kanska sat dysturin frá degnum fyri eisini í beinunum. Men tær hildu fyrst og fremst fast um verjupartin, soleiðis at Kyndil ongantíð fekk nakað sum helst rásarúm at gera nakað um seg, og so gjørdi tað minni, at VB-málini ikki longur vóru eins títt.

Tað ráddi fyrst og fremst um at greiða sína skyldu, og hetta varð eisini gjørt á sannførandi hátt.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-VB 17-31 (12-19)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Randi Wardum 5, Súsanna Petersen 4, Hildur Høghamar 4, Ann-Mari Wang 3(1), Linda Weihe 1
**VB:** Daiva Toumaite 10(1), Leila Jespersen 5, Aukse Vysniaskaite 4, Rannvá Augustinussen 4, Arnleyg Hjelm 3, Sólrun Krosslá 1, Margreth Augustinussen 1, Christina Holm 1, Jacoba Poulsen 1, Jóna Thorsteinsson 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, VB 1
**Útvísingar:** Kyndil 1
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Hansen

Stjørnan-VÍF 27-24 (18-11):

# Greiddu aftur skylduna

**Annan dagin á rað eydnaðist Stjørnuni at fáa fult, og annan dagin á rað var talan um ikki so øgiliga sannførandi avrik**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur verið sagt fleiri ferðir í heyst, at Stjørnan helst hevur breiðasta og sterkasta kvinnuhópin í landinum.

Tað er kanska heldur ikki nøkur lygn sum so, men hendan breiddin slapp so veruliga at standa sína roynd um vikuskiftið. Tveir dystir uttan Joan M. Djoredjevic og Alinu Olaru vóru á skránni, og tó at hesir vóru móti liðum, sum á pappírinum ikki skuldu givið teir øgiligu trupulleikarnar, so var saknurin sjónligur.

Men tað eydnaðist so eisini sunnudagin at fáa týdningarmiklu stigini til høldar. Serliga fyri steðgin tóktust tær á heimaliðnum sannførandi, og eitt skifti var líkt til, at VÍF veruliga skuldi fáa at vita.

Men eins og leygardagin, so eydnaðist ikki heimaliðnum at halda dampinum uppi allan vegin. Tað munaði sjávlandi væl, at Ioana Rápa fyri tað nógva varð hildin burtur frá álopsspælinum hjá VÍF, men spakuliga fingu gestirnir tó minkað um munin. Men nærri enn tveimum málum sluppu tær tó ikki. Stjørnan fekk aftur nakað av ferð á seinastu løtuna, og eftir at tær aftur høvdu økt í 26-22, var avgerðin follin.

Og við teimum báðum sigrunum um vikuskiftið slapp Stjørnan sær eisini aftur á oddasessin, har tær tó enn eru javnar við VB, sum tó hevur leikt ein dyst fleiri.

## FAKTA UM DYSTIN

**Stjørnan-VÍF 27-24 (18-11)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Annika Ljósstein 7(6), Katarina Stepanov 6, Beinta Joensen 5, Una Olsen 3, Anna Kristina Samson 2, Bára S. Klakstein 2, Louisa Andreasen 2
**VÍF:** Ioana Rápa 12(2), Alis Høghamar 6, Kirstin Helgadóttir 2, Linda Johannesen 1, Finngerð Joensen 1, Eyðritt Andreasen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 8, VÍF 2
**Útvísingar:** Stjørnan 6, VÍF 5
**Diskvalifikatión:** Stjørnan 1 (3X2 minuttir)